

# Trý kolvetnismál fyri tingið komandi vikuna

**Jan Müller**

16.03.2014 - 22:59

Oljan.fo

Tað er langt millum umrøðurnar av oljumálum á tingi. Vit skulu nógv ár aftur í tíðina til, at løgtingið umrøddi spurningar, sum hava tilknýti til oljuleiting og annað í hesum sambandi á føroyska landgrunninum.

Eftir at kolvetnislóggáva varð samtykt í 90-unum og seinni fleiri útbjóðingarumfør á landgrunninum, hevur ikki verið brúkt nógv tíð og orka at umrøða oljuleitingina. Hetta einamest tí hon hevur ligið í føstum kørmum.

Henda vikan verður tó eitt undantak í so máta. Ikki færri enn trý lógaruppskot koma fyri í løgtinginum, ið øll hava tilknýti til leitivirksemið á landgrunninum. Tvey teirra koma frá landsstýrismanninum í Vinnumálum, og eitt kemur frá Tjóðveldi.

Uppskotini frá landsstýrinum snúgva seg um at gera broytingar í galdandi kolvetnislóggávu. Í tí eina førinum er talan um at seta oljufeløgum krav um at hava fast

umboð í Føroyum, og í hinum førinum snýr tað seg um at brúka førleikapengar til marknaðarføring av landgrunninum. Hesi koma fyri tingið  mikudagin.

Uppskotið hjá Tjóðveldi snýr seg um at endurskoða kolvetniskattalógina og kemur fyri tingið hósdagin.

Lesið um einstøku uppskotini og viðmerkingar til teirra á oljan.fo komandi dagarnar.

Sí her leinkjur til málini:

http://www.logting.fo/casenormal/view.gebs?menuChanged=16&type=0&caseNormal.id=2379

http://www.logting.fo/casenormal/view.gebs?menuChanged=16&type=0&caseNormal.id=2380

http://www.logting.fo/casenormal/view.gebs?menuChanged=16&type=0&caseNormal.id=2369